

## Útlendingar hjá KÍ farnir heim

Heimasíðan hjá KÍ skrivar, at teir báðir amerikumenninir gevast eftir bert fáar mánaðir í bláu troyggjuni. – Eftir at hava verið partar av KÍ-hópinum í nakrar mánaðar, ynsktu teir ikki at halda fram og fara báðir av landinum í næstum. Venjarin Tony Paris harmast um avgerð teirra, men takkar teimum samstundis fyri gott samstarv og ynskir teimum alla lukku framyvir, skrivar heimasíðan hjá KÍ.

## OB og FCK skulu spæla finalu

Danska steypafinalan í fótbólti er altíð Kristi Himmalferðardag, og hon er altíð í Parkini. Hesa ferð verður finalan ímillum FCK og OB. Í kvøld vann FCK í Parkini 4-0 á Lyngby og Christian Lamhauge Holst. FCK vann 3-2 í Lyngby og harvið 7-2 samanlagt. Í hinari hálvfinaluni vóru OB og Viborg. Undan seinnu hálvfinaluni bendi nógv á, at Viborg fór at vinna sær finalupláss. Viborg vann fyrru hálvfinaluna 2-1 í Odense. Hóast teir vóru illa sperdir eftir heimadystin, og eydnaðist tað OB at vinna 2-0 í Viborg og harvið 3-2 samantalt.

EB/Streymur – NSÍ 1-0 (0-0):

# Perlumál gav trý stig

**Eitt frálíkt skot frá John Hera Dam gav EB/Streymi trý stig í Streymnesi í gjár. Dysturin var javnur og tættur, men verjurnar á liðunum báðum gjørdu arbeiðsdagin truplan hjá áleyparunum, og tí komu flestu kjansirnir deyðbóltar**

*EB/Streymur*

*NSÍ*

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Talan var um tættan dyst, har sera nógv gekk fyri seg á miðvøllinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

EB/Streymur eigur John Hera Dam, hann hevur eitt gott vinstra bein og nú eru trý stig aftrat á kontoini hjá felagsliðnum. Soleiðis ljóðar stutta frágreiðingin úr Streymnesi í gjár.

EB/Streymur skuldi staðfesta sína støðu sum oddalið, meðan NSÍ skuldi reisa seg eftir útivallartap móti HB. Tað var tó bert EB/Streymur, sum megnaði at fullføra setningin.

NSÍ hevði fingið Anderson við aftur á liðið. Hetta átti at hvest álopið, eftir at teir ikki skoraðu móti HB sunnudagin. Hann hevði tó seratruplararbeiðsumstøður yvirav Egil á Bø og ikki minst Marna Djurhuus. Í hinum endanum ansaði vespuverjan væl eftir áleyparunum hjá EB/Streymi, og tað merkti sostatt, at møguleikarnir oftast komu eftir deyðbóltar og sjáldan í opnum spæli.

### Vespurnar prikaðu

Hóast fyrri hálvleikur endaði málleysur, so fekk EB/Streymur tó bóltin í netið, tá hálvur tími var spældur. Gert Hansen skallaði frísparksinnlegg í málið, men varð rangstaddur.

Undan hesum hevði NSÍ hótt, og tað var um reppið, at teir skoraðu eftir frísparksinnlegg, og eftirfylgjandi høvdu trý hornaspørk, har bólturin at enda varð skotin upp um málið hjá EB/Streymi.

Tað var annars heimaliðið, sum hevði bóltin meiri enn gestirnir, men hesum fingu teir ikki serliga nógv burtur úr. NSÍ tóktist heldur ikki leggja serliga nógv í, at teir ikki høvdu bóltin eins nógv og EB/Streymur, tí tá teir fingu bóltin vóru teir nakað væl vandamiklari enn vertirnir.

Hetta sást millum annað aftur, tá René Tórgarð við arminum stórbjargaði málroynd úr stuttari fjarstøðu. Men tað gjørdist ongantíð til meiri enn prik frá vespunum, sum annars hava stungið mótstøðulið síni tólv ferðir í ár.

### Einfalt men frálíkt

Seinni hálvleikur var ikki ólíkur fyrra, men nú var meiri bit í álopinum hjá EB/Streymi. Beinanvegin vóru boð eftir NSÍ-verjuni, tá Bárður Olsen, John Heri Dam og Hans Pauli Samuelsen spældi seg ígjøgnum og góvu Hanus Eliasen bóltin, sum tó ikki fekk ordiligt skot á.

Tað sama kann ikki sigast um John Hera Dam, tá hann nakrar minuttir seinni royndi seg við skotið úr nógv størri fjarstøðu enn fuglfirðingurin. Bárður Olsen sendi hornaspark hart og flatt til havnarmannin, sum áraka brotsteigarhornið reiggjaði vinstra beinið. Henda kombinatión er eingin nýggj uppfinning og tað er eisini øgvuliga sjáldan, at hon gevur bonus. Men hesaferð rakti John Heri bóltin klokkureint, og í einum hørðum boga smeig bólturin seg upp nærmara málhorn. Eitt einfalt, men frálíkt mál!

### Tepurt men uppiborið

Aftaná málið royndi NSÍ at leggja eitt ávíst trýst á EB/Streym, og tíggju teir seinastu minuttirnar stóð á gomlum nøglum hjá felagsliðnum. NSÍ satsaði og setti tríggjar nýggjar mans á vøllin. Úrslitið var eitt øgiligt trýst kring brotsteigin hjá EB/Streymi, men annað enn tvær akrobatiskar saksasparksroyndir frá Anderson bleiv tað ikki til.

Tí ber til at staðfesta, at sigurin í Streymnesi til felagsliðið í Sundalagnum, var – hóast tepur – uppiborin.

## – Eitt slag av finalu

Símun Eliasen segði við kykmyndirnar hjá portalinum eftir dystin, at sigurin var av stórum týdningi fyri hansara lið.

– Tað var týdningarmikið, at vit vunnu henda dystin. Hann var líkasum eitt slag av finalu á sama hátt sum B36-dysturin var tað, og tí er tað óført, segði Símun Eliasen.

Fuglfirðingurin á vinstra bakki hjá EB/Streymi metti annars, at sigurin á NSÍ var uppiborin, har EB/Streymur eftir ein javnan fyrra hálvleik var betri í seinna.

Jónhard Fredriksberg tapti saman við liðfeløgum sínum fyri aðru ferð í ár. Honum dámar lítið at tapa og ásannaði í samrøðu, sum kann síggjast á www.portal.fo, at úrslitini teir báðar seinastu dystirnar hjá NSÍ, ikki hava verið eftir teirra høvdið.

www.portal.fo eru kykmyndir frá dystinum millum EB/Streym og NSÍ, har frálíka málið frá John Hera Dam sæst, umframt at samrøðurnar við Símun Eliasen og Jónhard Fredriksberg eisini eru at finna har.

# Fyrsti triðingurin nærkast endanum

**Tað kostar nógv hjá NSÍ, at tað gongst so illa at fáa stig á útivølli ímóti teimum, sum tað verður roknað við eru størstu kappingarneytarnir**

FORMULA-DEILDIN
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í dýrdarveðrinum mikukvøldið varð 7. umfar í landskappingini avgreitt. Harvið resta tvey umfør, inntil í gásareygum eykaumfarið, sum varð lagt afturat, tá ið kappingin varð longd, er fingið frá hondini.

Aftur í ár ber ikki til at siga annað, enn at longda kappingin er plettskot – higartil í hvussu so er. Tað hevði kenst púra burturvið, um tað nú hevði verið vent aftur til kapping í átjan umførum og við bólkaspæli í steypakappingini.

Mikukvøldið vunnu EB/Streymur og feløgini í Gundadali. Hesi trý eru nú oddalið soleiðis, sum tað hevur verið roknað við, at tey skuldu verða.

NSÍ kiksaði ímóti oddaliðnum í Streymnesi.

Innanhýsis uppgerðirnar ímóti teimum, sum tað verður kappast við, eru serliga avgerandi.

Í NSÍ vilja teir vera við í oddastríðnum. NSÍ hevur higartil ikki rokkið heilt upp hagar, sum tað í Runavík hevur verið vónað, at teir skulu røkka. Trupulleikin er útidystirnar. NSÍ hevur tapt á útivølli ímóti EB/Streymi og HB, og NSÍ hevur eisini tapt á útivølli ímóti KÍ. Samlaði málmunurin í hesum uppgerðunum hevur verið 0-5! Á heimavølli var eingin trupulleiki, tá ið NSÍ spældi ímóti B36, sum varð sent suður aftur við 3-0 tapi.

Á útivølli ímóti teimum bestu er trupulleikin hjá NSÍ, og tað tykist eisini vera trupult á útivølli ímóti teimum næstbestu. Sunnudagin skal NSÍ spæla í Gøtu. NSÍ fer at smokka heilt niður ímillum í toppinum, um tað ikki eydnast at fáa fulla úrtøku í Gøtu.

EB/Streymur, B36 og HB eru heilt støðug. Einasti toppdysturin, sum er eftir í fyrsta triðinginum, verður, tá ið HB annað mánakvøld fer at fáa vitjan av EB/Streymi. Lítil ivi man vera um, at HB fer at vinna á Argjum sunnudagin, og at EB/Streymur fer at vinna á heimavølli ímóti VB/Sumba. Eftir tað verður talan um rættuliga mannfólkauppgerð í Gundadali um tíggju dagar.

Í hinum endanum á støðutalvuni eru AB og VB/Sumba illa stødd. Skála skifti venjaran, og síðani hava skálamenn við málmuninum 6-0 fingið níggju stig! Tað hava teir á Argjum og í Vági heilt víst lagt til merkis!